# Talbot koma aftur

**Franska bilkonsernin PSA, Peugeot/Citroën, hevur ætlanir um at fara undir framleiðslu av einum nýggjum bíligum bilmerki, sum skal seljast undir navninum Talbot**

Talbot er eitt gamalt navn í bilheiminum. Fyrstu Talbot vóru gjørdir í Onglandi í 1903, og navnið varð brúkt heilt fram til 1955.

Í 70-unum kom navnið Talbot aftur fram á fronskum bilum hjá Chrysler, sum tá áttu rættindini til navnið, og í 1978 yvirtóku Peugeot evropeisku Chrysler bilmerkini og nýttu navnið á ymiskum bilum fram til 1992.

Nú er tað so PSA samtakið sum eigur rættindini til navnið, og eftir ætlan skulu Talbot kappast við bilar sum t.d. Dacia, sum er bíliga bilmerkið hjá Renault.

**mg**



*Talbot Horizon 1,5 SX frá 1981*



*Talbot verður eitt bíligt bilmerki hjá bilkonsernin PSA, Peugeot / Citroën*



*Talbot búmerki*



*Talbot Lago T26 cabriolet frá 1946*



*Talbot Lago T150 SS Special vóru gjørdir frá 1937-39*

# Mazda eftir Transsibirisku jarnbreytini

**Sum teir fyrstu nýta Mazda nú ta kendu Transsibirisku jarnbreytina at flyta nýggjar bilar frá Japan til Russlands**



*Við Transsibirisku jarnbreytini vera Mazda bilarnir frammi 30 dagar fyrr enn vanligt hevur verið við skipi og bilaflutningsvognum*



Fyri at nøkta tann stóra eftirspurningin eftir Mazda bilum í Russlandi hava Mazda sum teir fyrstu valt at nýta ta kendu Transsibirisku jarnbreytina at flyta nýggjar bilar frá Japan til Russlands.

Fyri russisku kundarnar merkir hesin nýggi bilaflutningurin, at Mazda bilarnir verða frammi 30 dagar fyrr enn vanligt hevur verið við skipi og bilaflutningsvognum, sigur Jørgen Olesen, sum m.a. hevur ábyrgd av kundanøgdsemi hjá Mazda Motor Europe.

Tokvognarnir koyra tann 9.300 km langa teinum frá Zarubino, nærhendis Vladivostok, til Moskva upp á 10 dagar. Hvør tokvognur tekur 30 Mazda bilar.

Transsibiriska jarnbreytin varð upprunaliga bygd frá 1.891 til 1.913 sum eitt net av jernbreytum ið bindur Moskva og tað evropeiska Rusland við lond í fjareyst sum t.d. Mongolia, Kina og Japanska Havið.

**mg**




# Tíðindaskrivið Ellisakfør

Tíðindaskrivið Ellisakfør verður í hesum døgum sent út til limirnar í áhugafelagnum Føroya Ellisakfør.

Talan er um 17. árgang av blaðnum, sum er í A5 støðd við 36 blaðsíðum.

Í blaðnum eru áhugaverdar greinar um tiltøk felagsins, sum t.d. túrar við bilum og motorsúkklum bæði í Føroyum og uttanlands.

Áhugafelagið Føroya Ellisakfør varð stovnað í 1992, og felagið hevur givið út limabløð øll árini.

Formaður í felagnum er Eirikur Ó. Simonsen, næstformaður er Hans Korsgaard, Páll Danielsen er skrivari, Hans Jákup Michelsen er kassameistari og Finn Jespersen er nevndarlimur. Eykalimir eru John Christiansen og Búgvi Apol. Heimasíðan hjá felagnum er: www.ellisakfor.com.